VIÐMERKINGAR

# Jólamaðurin og føroyskur landspolitikkur

Hjalmar N. Poulsen,



Vit, sum enn eiga tungu í munni, blýant og pappír, eru sæl í sinni, at vit á henda hátt kunnu kunngera tær beistagerðir, sum landsins leiðandi menn hava gjørt seg sekar í. Sjón gongur fyri søgn:

**Fyri tað fyrsta:** Fíggjarmaráðharrin hevur misnýtt lógarásettu heimild sína. Hetta er onki minni enn maktmisnýtsla av grovasta slag!

**Fyri tað næsta:** Stendur hann á landsins hægsta røðarapalli og framførur seg við ósannindum og villeiðingum av grovasta slag, fyri hervið at kunna rættvísgera magtmisnýtsluna.

**Fyri tað triðja:** Aftaná at hava sett allar lógligar fyriskipanir til viks, sum av teimum sjálvum eru góðkendar á demokratiskum og lógligum grundarlagi, fara teir inn at lóggeva við diktatoriskari handamegi, og harvið spotta og vanvirða demokratiska rættin, til frama fyri teirra egnu ógerðir.

Tað verður ikki í nakran máta tolt! Og tað skal sláast fast, at maskinmeistararnir, sum allir eru í eini ábyrdarfullari, samfelagsligari tænastu hjá SEV, verða skírdir "Belsebup" fyri herverksgerðir landsstýrismanna, og at samfelagið í fleiri døgn lá í andaleypi, vegna skamtan av elorku, orsaka av hesi beistagerð, verður ikki góðtikið.

Alt hetta fór fram við beráddum huga. Endamálið við beistagerðini var at fáa gjøgnumtrumfað teirra sjónarmið, stjala trumfin úr hondini á mótpartinum, og goyma hann til heystar, at spæla út við. At samgongulimirnir á henda hátt skuldu snýtast, so atkvøða teirra, tá avtornaði, lá røttu megin á vektstongini, var uttan yva lilvitað, tí herverkið var avrátt í góðari tíð frammanundan.

Fylgdi orðaskiftinum, sum var útvarpað úr løgtingsalinum. Má viðganga, at eg undraðist og øtaðist stórliga við, at slíkt kundi lata seg gera, uttan at yvirhøvur nakar løgtingslimur talaði at.

At fíggjarmálaráharrin á henda hátt hevur gjørt seg sekan í lógarbroti á høgum støgi er eitt. Men at hetta brotsverkið verður góðtikið av løgtingsmanningini yvirhøvur, er undir alt lágmark. Hetta hevði ikki kunnað latið seg gjørt í nøkrum øðrum samfelag á norðaru hálvkúlu, anno 2005. Tað er eisini skjalprógvað, at lógarheimild fíggjarmáláráharrans, er misbrúkt fleiri ferðir, og so dyggiliga eisini á hesum sinni.

Øll hesi orð, sum skjalfest eru seinastu 10 dagarnar av undirritaða, eru sonn og standa við makt! Skal taka fulla ábyrgd av hvørjum bókstavi. Um fíggjarmálaráharrin ikki vil geva mær rætt í hesum máli, er hann meira enn hjartaliga vælkomin at geva ljóð. Í aðrar mátar kann hann bert endurtaka síðstu orð síni viðvíkjandi hesum máli,: ("onga viðmerking") ella lata verða.

---ooo---ooo---

Og til tykkum øll sum trúgva, at jólamaðurin er veruleiki, ella at føroyskur landspolitikkur og lodrættar lygnir, ikki hava naka við hvørt anna at gera, "forget it" -trúgvi umaftur!

---ooo---ooo---

Tankar renna mær í hug, um ússaligu førlúsina, sum í illveðrinum stríddist í óruddiligu seyðaullini, at hon í neyðini, skuldi koma sær nærri heita veðrakroppaskinninum,. Lukkuliga óvitandi, ásannaði hon seinni, at hetta var bjarging hennara.

Betur var, hon tá á stóð, fann sær annað hold; og kannska eru lúsatankar ikki veruleikafjarðir í umsitingini.

Heystfjøllini vóru gingin.

- Prúða veðrakrovið hekk í spongum á kjallsbitanum og skrubbsaltaða veðraskinni lá á kjallsgólvinum.
- Førlúsin var deyðastirgd!

Ja, kaldligt man fara at verða til heystar! Eisini hjá jólamanninum.

# Gamlar myndir í Ribarhúsi

TÍÐINDASKRIV

Hósdagin 21. juli 2005 kl. 17 letur upp ein fotoframsýning í Ribarhúsi í Fuglafirði. Myndirnar, sum allar eru frá 1938, hevur fuglfirðingurin í útlegd Jógvan Julius Joensen tikið. Julius fór til Danmarkar at læra skipasmíð í 1931. Tá hann var útlærdur í Frederikssund, flutti hann til Gilleleje at búgva og arbeiða, og har býr hann enn, nærum 95 ára gamal.

Foreldur Juliusar vóru Jóhannes Peter Joensen úr Jógvanstovu á Eiði og Malena úr Niðristovu í Fuglafirði. Tey búsettust í Fuglafirði. Julius var triðelstur av teirra sjey børnum. Tey vóru: Martina, Jenny, Julius, Sidonius, Jakku, Ismar og Paula. Sum flestu dreingir tá í tíðini, fór Julius til skips sum 14 ára gamal. Hann var 6 ár við slupp, áðrenn hann fór til Danmarkar.

Í juni 1938 giftist Julius við Adu Andersen úr Gilleleje. Tær uml. 60 myndirnar eru allar tiknar á brúdleypsferð teirra í Føroyum. Flestu myndirnar eru úr Fuglafirði, meðan hinar eru úr øðrum bygdum í Eysturoynni og úr Kirkjubø. Umframt myndirnar verða onkur gomul skjøl at síggja á framsýningini, so sum manningarlistin frá fyrsta túri hansara til skips í 1925 og lærusáttmálin frá 1931.

Fuglafjarðar Fornminnisfelag skipar fyri framsýningini, sum verður opin til 3. august. Høvi verður at stuðla virksemi felagsins við at bíleggja myndir.

Landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, fer at siga nøkur orð, tá framsýningin letur upp. Eisini verður sangur og tónleikur at hoyra.







